Graviditetur kostaði Óluvu starvið:

# Nú fær hon endurgjald



*Óluva Hansen úr Nólsoy saman við sjeikinum, Bárði Drangá, á støðni úti í Nólsoy. Óluva hevur fingið eitt stórt endurgjald, eftir at hon var fyri týðandi mismuni vegna graviditet. Lítli Julian Matteus liggur lukkuliga óvitandi í barnavogninum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tá 21 ára gamla Óluva Hansen úr Nólsoy fór í læru sum bakari hjá Grón í Havn, hevði hon fingið sítt dreymastarv. Men tá hon stutt eftir gjørdist við barn, bleiv hon send til hús við grundgevingum, sum hon als ikki kendi aftur. Nú fær hon stórt endurgjald fyri viðferðina, sum hon fekk á bakaríinum**

ENDURGJALD

*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Leiðslan í bakaríinum Grón fer óivað at hugsa seg betur um, næstu ferð tey senda eina barnakonu til hús. Javnstøðunevndin hevur nevniliga gjørt av, at Bakaríið skal rinda eini ungari kvinnu 143.500 krónur í endurgjaldi fyri at hava brotið javnstøðulógina í einum máli um uppsøgn.

## Graviditetur kom uppá tvørs

Óluva fór til arbeiðis á Grón tann 16. oktober í 2006, og henni dámdi væl á tí stóra bakaríinum í Havn. Fyrstu tríggir mánaðirnir vórðu skipaðir sum royndartíð, har báðir partar hava rætt til at siga samstarvið upp, men tá royndartíðin var liðug tann 16. januar í 2007 fekk Óluva tilboð um at halda fram á bakaríinum. Samstarvið riggaði eftir øllum at døma fínt, og Óluva hevði hug at halda fram sum bakari.

Stutt eftir at royndartíðin var liðug, og partarnir vóru komnir ásamt um at halda fram, gjørdist Óluva varug við, at hon var við barn. Hon boðaði síðani leiðsluni frá hesum síðst í januar mánað.

Mitt í februar mánaði gjørdist Óluva sjúk orsakað av graviditetinum, og hon


# Skrivstovufólk til Det Norske Veritas (DNV)

## www.dnv.fo



Vit søkja eftir einum skrivstovufólki til skrivstovu okkara á Vestaru bryggju í Tórshavn at byrja 1 apríl 2008.

Starvið, sum er niðursetta tíð (15-18 tímar um vikuna), er fjølbroytt við nógvum ymiskum uppgávum innan umsiting:

- Rokskap
- Skráseting
- Arkivering
- Samskifti á føroyskum, donskum og enskum.
- IT
- Leiðslu skipan.

Tað mesta av arbeiðinum fer fram á framkomnum IT skipanum.

Vit leggja dent á:

- Flexibilitet
- Samstarv
- Trivna
- Álit
- Støðuga menning.

Vit eru 5 fólk á deildini í Føroyum, har vit arbeiða saman á ein óformellan men professionellan hátt, og vit kunnu bjóða tær eina góða løn við pensión og trygging eftir Skandinaviskum leisti.

**Hevur hetta tín áhuga so send okkum eina umsøkn við CV. Til Andrass.Joensen@DNV.com ella til:**

**Det Norske Veritas,**
**Vestara Bryggja, 5 Hædd,**
**FO-100 Tórshavn.**

Um tú hevur onkran spurning ring so til Andrass Joensen, Deildarleiðara á tlf 213750 Les um okkum á www.dnv.fo ella www.dnv.com

**Umsóknar freist: 7. februar 2008**

**DNV is unique. With us, you are constantly given challenges in your area of expertise and the opportunity to make an impact beyond business.**

Det Norske Veritas (DNV) is a global provider of services for managing risk. Founded in 1864, DNV is an independent foundation with the purpose of safeguarding life, property and the environment. DNV offers a truly international environment, comprising 300 offices in 100 countries, with 7,000 employees.

MANAGING RISK DNV



# TØKK

Øllum tykkum, sum stuðlaðu Tjóðveldisflokkin á valinum 19. januar takki eg hjartaliga.

Ein serstøk tøkk til tykkum, sum stuðlaðu mær persónliga.

*Vinarligar heilsanir*
**Heini O. Heinesen**
Tlf. 456810 - 216824
http://heima.olivant.fo/~hoyh/



TJÓÐVELDI